## Starv á Fróðskaparsetri Føroya

### Lektari í samfelagsfrøði

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í samfelagsfrøði leyst at søkja. Starvið verður sett sum lektarastarv, og tann ið settur verður, skal virka fyri at menna gransking, útbúgving og undirvísing í samfelagsfrøði á deildini.

**Starvsøki:**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um at hava ábyrgd av útbúgvingini í samfelagsfrøði og at undirvísa. Tann, ið settur verður, skal eisini vera við til at endurskoða núverandi B.S.Sc.- útbúgving í stjórnmálafrøði, áðrenn studentar verða tiknir upp til nýtt nám at byrja á heysti 2009.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving sum stjórnmálafrøðingur ella líknandi frøðigrein hava granskaraútbúgving á Ph.d. stigi og undirvísingarroyndir.

Við umsóknum skulu fylgja avrit av vísindaligum avrikum í trimum eintøkum, eins og umsøkjarar skulu lýsa undirvísingarroyndir sínar.

Sett verður metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

Starvið verður at seta 1. oktober 2008.
Umsóknarfreistin er **11. august 2008.**

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, telefon 352583/226495, elinsj@setur.fo ella til Beintu í Jákupsstovu, telefon 352582, beinta@setur.fo. Upplýsingar um virksemi á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**

***FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA***
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

---

Runavíkar kommuna

## Námsfrøðingur/hjálparfólk til Dagstovnin í Oyndafirði

Á Dagstovninum í Oyndarfirði ganga 14 børn í aldrinum 0 – 7 ár.

Søkt verður eftir:
Námsfrøðingi at byrja 11. august. Starvið er 20 tímar um vikuna.
Um námsfrøðingur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.

**Vit ynskja at tú:**
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teimum vaksnu
- hevur góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum
- hevur hug til at skapa og seta dám á dagstovnin

**Vit bjóða**
- Eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika
- Eitt arbeiðspláss har tú kemur at hava ávirkan
- Góðar arbeiðsumstøður
- Hollan pedagogiskan stuðul frá leiðsluni

**Meira fæst at vita:**
um starvið við at venda sær til Bessa Bjarnason leiðara á tlf 237002

**Setanarviðurskifti:**
Pedagogur/hjálparfólk verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommununala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn, við møguligum avriti av prógvi og viðmælum, skal verða Runavíkar kommunu í hendi í seinasta lagi 04.08.2008 kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
Postrúm 139
610 Saltangará

---

FØROYA LÆRARASKÚLI

## Størv á Føroya Lærarskúla

Á Føroya Lærarskúla eru tvey føst størv sum lærarar leys at seta frá 1. august 2008. Annað er fulltíðarstarv í myndlist, og hitt er hálvtíðarstarv í tónleiki og sangi.

Harafturat eru tímalærarastørv leys í samfelagsfrøði, ítrótti og heimkunnleika.

Undirvíst verður á pedagogútbúgvingini og/ella lærarútbúgvingini.

Førleikakrav er hægsta fakliga útbúgving innan økið, námsfrøðilig útbúgving og royndin at undirvísa. Roknað verður við, at tey settu eisini luttaka í øðrum virksemi á stovninum, eitt nú toymisarbeiði, menningarvirksemi og starvslæruvegleiðing, umframt at tey duga væl at samskifta og samstarva.

Løn og treytir annars sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Nærri fæst at vita við at seta seg í samband við rektaran joannes@flsk.fo, tlf. 21 18 22.

Umsóknarfreistin er **mánadagin 30. juli 2008.**

Umsóknir skulu sendast til

Føroya Lærarskúli
Att. Rektarin
Frælsið 20
Postboks 348
FO-110 Tórshavn

Á Føroya Lærarskúla eru tvær útbúgvingar, lærara- og pedagogútbúgving. Lestrarárið 2008/09 lesa 5 flokkar til lærara og 5 til pedagog, samanlagt uml. 240 lesandi.. Fyri komandi 1. flokkarnar verður lesturin skipaður á BA-støði. Frá 1. aug. 2008 verða Fróðskaparsetur Føroya, Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya og Føroya Lærarskúli lagdir saman til ein stovn.

---

## Frítíðar / familju bátur til sølu

Riviera 925 - flybridge version, árg ´96.
10,25 m langur, 3,20 breiður, 90 cm dýpd.
Allar hentleikar - so sum kaffimaskina, køliskáp, kókiplátur, oljufýr, wc / brúsa, bóvskrúva, el akker, o.a.
8 sitipláss, 5 sovipláss - 2 kømur
motor: 1 volvo penta, kad300, 285 HK, árg ´06 - siglt 275 tímar
Báturin hevur skaða og kann síggjast eftir avtalu eins og á www.huseklepp.net.
nývirði 1.775.000 kr - marknaðarvirði ístandgjørdur ca. 1.200.000 kr.
**- selist fyri nøktandi boð.**

**Um áhugi, so ring 229654**

---

## Lærari til Hovs skúla

Søkt verður eftir lærara til uml. 5-8 avlopstímar um vikuna fyri skúlaárið 08/09.

Í Hovs skúla eru 3 næmingar, harav 2 í 5. fl. og 1 í 7. flokki.

Umsóknir skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 1. august, og skulu sendast til Óla Johannesen, Sjógøta 118, 800 Tvøroyri.

Meira fæst at vita frá skúlaleiðaranum Óla Johannesen, tlf. 272647.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**HOVS SKÚLI**

---

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

## MØBLERAÐ ÍBÚÐ ELLA HÚS

Landssjúkrahúsið søkir, til eitt av okkara starvsfólkum, eftir møbleraðari íbúð ella húsum við í minsta lagi tveimum sovirúmum umleið 60 – 120 fermetrar til leigu skjótast gjørligt.

Vinarliga sigið frá á telefon 30 45 00 – lokal 1270 ella teldupost heot@ls.fo

**Heimir Ottósson,**
**Leiðandi húsavørður.**